# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Heystferð í Stephanssons Húsi




*Fríggjadagin 31. august var fernisering í »Art Gallarí Stephanssons Hús«, tá listakvinnan Rannvá Holm Mortensen læt upp framsýningina »Heystferð«*

**FERNISERING**
*Myndir: Jan Müller*

Rannvá Holm Mortensen, listakvinna, hevur hesum døgum framsýningina »Heystferð« í »Art Gallarí Stephanssons Hús« á Kongabrúnni í Havn. Í hesum sambandi var fernisering í gallarínum fríggjadagin 31. august, har nógv fólk nýttu høvið at støkka inn á gólvið.

Rannvá kallar framsýningina »Heystferð«, tí framsýningin er um tann partin av lívinum, tá heystið nærkast. Teir 15 málningarnir á framsýningini, sum allir hava sína søgu, eru rættuliga sermerktir, kreativir og litríkir. Teir flestu eru málaðar í ár. „Tað eru so nógvir møgu leikar í myndum, og tað er júst hetta, sum er so dragandi“ sigur Rannvá, sum annars er sjúkrahjálpari og starvast á Landssjúkrahúsinum.

Í november fer Rannvá til India at búgva í nakrar mánaðir. Í fjør var hon eisini í India.



*Rannvá saman við verfamiljuni f.v.: Helga Diklev, Marjun Nielsen, Jógvan Tróndarson, Marita Milo, Jóannes Nielsen og Sigrid Tróndarson*



*Systkini Niels Christian og Ingvør Nolsøe*



*Solveig Dam, Rannvá Mortensen og Birita Mohr*



*Turid Holm og Hildur Patursson*

# Atli Dam hevði fylt 75 ár í dag

Í dag 12. september hevði Atli P. Dam, fyrrverandi løgmaður, fylt 75 ár. Atli Dam doyði 7. februar í 2005, 72 ára gamal.

Hann trein inn á politiska pallin í 1970, tá boð vóru eftir honum úr Kuwait, har hann arbeiddi sum verkfrøðingur.

Javnaðarflokkurin hevði tá mist tveir sterkar profilar. Pápi Alta, Petur Mohr Dam, doyði í 1968. Hann var tá løgmaður. Hini í landsstýrinum vóru Kristian Djurhuus úr Sambandsflokkinum og Sámal Petersen úr Sjálvstýrisflokkinum. Eftir deyða P. M. Dam varð landsstýrið umskipað, so Kristian Djurhuus tók við sum løgmaður, meðan Javnaðarflokkurin fekk tveir landsstýrismenn, Villi Sørensen úr Klaksvík og Jákup Lindenskov úr Havn.



Men Villi Sørensen doyði brádliga nýggjársnátt í 1970, og tá var tað, at flokkurin sendi boð eftir Alta Dam, sum 9. mars sama ár tók við sum landsstýrismaður.

Væl lá fyri hjá hesum 37 ára gamla politikara, sum eftir valið í november sama ár skipaði landsstýrið – og var sitandi sum løgmaður í góð tiggju ár út í eitt.

Aftur at hesum tíggju ára skeiðnum tók Atli Dam aftur við sum løgmaður í 1985 og sat til 1989. Hann tók við aftur, eftir at Javnaðarflokkurin vann stórsigur á løgtingsvalinum í 1990. Hann legði frá sær í januar í 1993, tá Marita Petersen tók við sum lømgaður. Atli Dam sat sum løgmaður í tilsamans 16 ár.

Atli Dam gavst í politikki í 1994, tá Javnaðarflokkurin leið stóran ósigur og misti fimm av tíggju tinglimum. Atli Dam var ein teirra.

Hann varð føddur á Tvøroyri, sonur Petur Mohr Dam, sum stovnaði Javnaðarflokkin, og Ragnhild, fødd Strøm úr Trongisvági. Atli var útbúgvin maskinverkfrøðingur í 1964.

Hann var varastjóri í Færøernes Realkreditt Institutt 1981-85 og frá 1993-2005.

Áðrenn Atli tók við sum løgmaður var hann landsstýrismaður frá 9. mars í 1970 til 11. desember í 1970. Hann varð valdur á ting í Suðuroyar valdømi í 1970, 1974, 1978, 1980, 1984 og 1988. Í 1990 varð hann valdur í Suðurstreymoyar valdømi. Hann varð eisini valdur í fólkatingið í 1990.